


## Kaj Ennigarð til KÍ

KÍ kundi í gjárkvøldið boða frá, at felagið hevur gjørt sáttmála við Kaj Ennigarð úr GÍ. Kaj er 22 ára gamal, og seinnu árini hevur hann verið fastur partur av GÍ-hópinum. Tað var tó ikki fyrr enn í ár, at hann veruliga beit seg fastan, og flestu eygleiðarar eru á einum máli um, at hann í ár var ein av hornasteinunum í góðu úrslitunum, sum GÍ fekk stóran part av árinum.



## Føroysk genta við íslendskum meti

Føroyska Kristin Lív Jónsdóttir, sum er ættað úr Miðvági, setti um vikuskiftið nýtt íslendskt met í renning á 80o metrum. Kristin Lív rann teinin í tíðini 2.37,59, og hetta var júst nóg mikið til at tryggja henni gullið í stórari rennikapping, eins og talan var um nýtt met á teininum.

## -Eg eri sera vónbrotin

Eftir sjeynda ósigurin á rað hjá KÍF fingu vit orðið á ein av leikarunum hjá KÍF, Ellu Joensen. Hon var ógvuliga skuffað eftir enn eitt tap.
- Hetta var ræðuligt. Vit útføra taktikkin til fulnar fyrstu tvey settini, og her megna vit eisini at halda konsentratiónini. Í triðja setti gerast vit heldur ókonsentreraðar, og eftir hetta missa vit høvdið. Vit blíva bangnar og tora ikki at gera feilir. Man skal tora at gera feilir, tí annars vinnur man ikki flogbóltsdystir. Í síðsta enda kemur rutinan tó ÍF til góðar, men tá skuldu vit helst longu havt vunnið dystin.

KÍF-ÍF 2-3 (25-19, 29-27, 16-25, 16-25, 12-15):

# ÍF heldur fast um góðu støðuna

**ÍF megnaði at venda einum hóttandi tapi til ein tepran sigur í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær vitjaðu hjá KÍF í Kollafirði. Ikki minst takkað verið stórspæli frá Helen á Lakjuni**




KVINNUFLOGBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

ÍF tryggjaði sær ein týdningarmiklan sigur í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær vunnu harða útidystin ímóti KÍF. Tað leikaði tó hart á hjá kvinnunum úr Fuglafirði, sum taptu fyrstu tvey settini, áðrenn tær komu í gongd. Tær vístu tó góðan vilja og megnaðu at berja seg inn aftur í dystin, sum tær at enda vunnu 3-2.

**KÍF legði hart út**

Í byrjanini var annars einki sum bendi á, at ÍF fór at vinna dystin á botnliðnum. KÍF legði bragdliga fyri, og kvinnurnar úr Kollafirði vunnu eisini fyrsta settið. ÍF kom á odda 0-3 beinanvegin í hesum settinum, men KÍF svaraði skjótt aftur. Nakrar bóltar seinna hevði KÍF javnað út, og so fylgdust liðini í eina løtu. Mitt í fyrsta setti megnaði KÍF tó at vinna seg fram við ÍF, og at enda vann KÍF settið trygt, 25-19.

Í øðrum setti legði ÍF betri fyri. Eftir eini løtu høvdu tær vunnið seg fram um 8-12, og henda munin hildu tær leingi. Seint í settinum vann ÍF ein týdningarmiklan bólt og legði seg harvið á odda 15-20, og so tóktist settið avgjørt. Men KÍF-kvinnurnar vildu ikki geva skarvin yvir. Tær kempaðu um hvønn bólt, og av næstu sjey bóltunum vann KÍF seks teirra, og so stóð á jøvnum 21-21. Eftir hetta skiftust liðini um at føra, men at enda dró KÍF longra stráðið. Tær vunnu annað sett 29-27.

Hesi bæði fyrstu settini fekk KÍF spælið at hanga saman. Móttøkurnar vóru góðar, álopið koyrdi væl, blokkurin riggaði og so vístu leikararnir eisini rætta viljan, sum hevur manglað síðstu dystirnar.

KÍF dovnaði tó nakað í triðja setti, og hetta gav ÍF ein nýggjan møguleika at koma inn í dystin. Henda møguleika tóku ÍF-leikararnir við opnum ørmum. Eftir lítlari løtu førdi ÍF 2-8, og henda leiðslan bara øktist. At enda vann ÍF triðja sett 16-25, og her var munurin stórur á liðunum.

Gongdin í fjórða setti var nakað tann sama. Her var KÍF betri við fyrstu løtuna, og tær vóru eisini framman fyri 10-9, men so dró ÍF frá. Løtu seinni førdi ÍF 11-16, og so økti ÍF enn meir um leiðsluna.

**Helen gjørdist avgerandi**

Í avgerandi javnbrótaranum komu royndirnar ÍF til góðar. Stóran part av dystinum hevði ÍF lagt nógv á herðarnar hjá Helen á Lakjuni, og hon vísti eisini høgan klassa í fimta setti. Mest sum allir bóltarnar fóru til hana, og í flestu førunum takkaði hon fyri álitið og knallaði bóltin í gólvið. KÍF royndi tó at fylgja við, men alt settið haltaðu tær aftanfyri rutineraðu fuglfirðingarnar. Seint í settinum førdi ÍF 7-12, tá KÍF tók time-out. Eftir hetta gjørdi KÍF eina seinastu roynd at koma aftur í dystin. Tær megnaðu eisini at vinna seg upp á 12-14, men so steðgaði. ÍF vann síðsta bóltin, og sostatt fingu tær vent einum hóttandi tapi ímóti einum av botnliðunum til ein sera týdningarmiklan sigur, ikki minst takkað verið eini vælleikandi Helen á Lakjuni, sum veruliga traðkaði til, tá ÍF hevði brúk fyri henni.

## -Kundi fari báðar vegir

Eftir sera týdningarmikla ÍF-sigurin fingu vit orðið á ein av royndastu leikarunum hjá ÍF, Randi Larsen. Hon var glað fyri sigurin, men metti, at hann kundi fari báðar vegir.
-Liðini í meistaradeildini hjá kvinnum eru ótrúliga jøvn, og tað síggja vit eisini í dag. Dysturin kundi fari báðar vegir, men tíbetur vinna vit dystin. Vit fáa eina ringa byrjan, og tað tykist, sum vit ikki eru heilt gearaðar upp fyrstu settini. Men tá vit so koma í gongd, so gongur ótrúliga væl. Eg haldi, at rutinan kemur okkum til góðar at enda í dag, og at hon er største orsøkin til sigurin.

# Sivic aftur í Vági

Tað, sum hevur ljóðað seinastu dagarnar, varð veruleiki í gjárkvøldi. Tomislav Sivic verður nevnliga nýggjur venjari hjá VB/Sumba.

Tað vóru boðini, sum spælararnir fingu frá leiðsluni á spælarafundi í gjárkvøldið, og sum skilst er boðini væl móttikin millum spælararnar. Ikki minst, tí felagið hevði góð úrslit í 1996, tá Tomislav av fyrstan tíð kom til føroyskan fótbólt. Ta ferðina sum spælandi venjari hjá VB.

Eftir hetta fór hann til Havnar, har hann vandi B36 í trý ár. Og har hann millum annað var við til at tryggja felagnum fyrsta gullmerkið í 35 ár.

Árini 2000 og 2001 var hann venjari hjá KÍ, men síðani hevur tað verið uttanlands, at hann hevur roynt seg. Hann var venjari hja U-landsliðnum heima í Serbia, umframt at hann eisini hevur fingið royndir í bestu serbisku deildini. Eitt skifti tóktist hann eisini skula gerast næsti venjarin hjá Uganda, men hetta varð tó av ongum, tá fótbóltssambandið har ikki helt tey lyfti, sum annars vórðu givin.

Síðani hevur hann aftur virka sum venjari í Serbia, men har hava úrslitini tó verið rættiliga sveiggjandi.

Mynd: Sivic

*ÍF ÍF megnaði at venda einum hóttandi tapi til ein týdningarmiklan sigur, tá tær vitjaðu hjá KÍF í Kollafirði í gjár. Við sigrinum heldur ÍF fast um góðu støðuna í oddinum*

*Mynd: Álvur*

